## Kunningar- og umsitingarfólk

Vit sóknast eftir einum avloysara!

sum kann **samskifta** við og kunna mongu viðskiftafólk okkara, beina tey á rætta stað og svara skrivligum fyrispurningum. Vilt tú vera við til at hjálpa okkum at veita okkara viðskiftafólki betri tænastur umframt við innanhýsis samskifti og at loysa ad hoc uppgávur saman við verkætlanarleiðarum?

- Brennir tú fyri at samskifta og veita góðar tænastur?
- Dámar tær væl at arbeiða í móttøku og at samskifta við nógv fólk dagliga?
- Ert tú væl fyri, tá tað kemur til at samskifta skrivliga?
- Hevur tú góðar førleikar í føroyskum, norðurlendskum og enskum ella øðrum altjóða máli?
- Kanst tú rættlesa? (Fyrst og fremst føroyskt, men gjarna eisini enskt).
- Hevur tú skil fyri systematikki?
- Kanst tú halda nógvum bóltum í luftini í senn?
- Hevur tú gott yvirlit – eisini tá hini hava mist tað?
- Dugir tú væl at føra teg fram millum nógv ymisk fólk – høg sum lág – heima sum úti?
- Ert tú skjót/ur til at síggja møguleikar heldur enn forðingar?
- Dámar tær væl at samskifta og netverka – eisini í altjóða høpi?
- Dugir tú væl at seta teg inn í hugskot hjá øðrum, og hevur tú skil fyri at føra tey út í lívið?
- Dugir tú væl at samskipa – og at arbeiða í toymum og netverkum?

**Gev gætur**
Starvið verður eisini í ávísan mun lagað til førleikarnar hjá nýggja starvsfólkinum. Starvið er eitt avloysarastarv. Starvsfólkið verður sett í 1 ár fyri fólk, sum eru farin í barnsburðarfarloyvi.

**Umsókn**
Hevur starvið tín áhuga, og kanst tú svara flestu av omanfyristandandi spurningum játtandi, so send eina umsókn til:

**SamVit, Bryggjubakki 12, Postboks 118, FO-110 Tórshavn.**
**Att.: Elin Heinesen, stjóri.**

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 29.mai 2008. Tað er eitt krav, at tú dugir at tosa og skriva á føroyskum.

**Spurningar**
Spurningar í sambandi við starvið kunnu setast til Elina Heinesen, stjóra á SamViti, tlf. 306900.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er eitt avloysarastarv, sum varar í 1 ár. Tú byrjar í starvinum sum skjótast ella í seinasta lagi 1.juli 2008. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

*SamVit er ein almennur stovnur, sum fevnir um fyrrverandi Ferðaráð Føroya og Menningarstovuna, ið løgdu saman um ársskiftið 2006-2007. SamVit virkar eftir tí til eina og hvørja tíð galdandi vinnupolitikki og arbeiðir í høvuðsheitum fyri: At birta uppundir at burðardyggar vinnur, sum hava alheimin sum marknað, verða mentar. At økja tilvitanina um kappingarsamleika føroyinga og virka fyri, at føroysk vinna gerst altjóða kappingarfør. At skapa nýggjar vinnu- og útflutningsmøguleikar við at styrkja innlendis samstarvið, so vinnan stendur sterkari úteftir, knýta sambond og skipa netverkan bæði innlendis og út í heim. Í samstarvi við vinnuna at kunna um og marknaðarføra Føroyar, føroyskar vørur og tænastur og Føroyar sum íløguland og sum ferðaland.*

SamVit
Faroe Islands Enterprise




# Summarhjálp søkist



**Vit søkja eftir fyrikomandi og tænastusinnaðum fólki, at byrja skjótast gjørligt.**

**Høvuðsuppgávan verður at røkja dagligu kundar okkara. Men hjá okkum er eingin dagur eins, og tí kann júst tín smidleiki vera við til at gera munin.**

**Arbeiðstíðurnar verða skiftandi, býttar á heilar dagar, hálvar dagar og vikuskiftir. Tað er eisini ein fyrimunur, um tú kannst traðka til, tá tørvur annars verður á tí.**

**Vit vænta, at tú tosar enskt og skandinaviskt, og hevur koyrikort til persónbilar.**

**Um hetta er nakað fyri teg, so set teg í samband við okkum á tlf.: 313 535 og spyr eftir Hálvdan ella Karin, ella send ein teldupost til avis@avis.fo**

*Avis Bilútleigan*
*Tel. 313 535*
*avis@avis.fo*

AVIS
We try harder.